**TIL SØLU**
Eitt marmor sofaborð til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 316016

**TIL SØLU**
Hillar, skáp, skuffur og kommodur til sølu. Við eru listar til at heingja alt á. Alt bíligt.
Tlf. 220660

**TIL SØLU**
Svartir leðurmøblar, 3+1 +1, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 333332

**TIL SØLU**
Stálreol, 100 kr. Køksborð + 4 stólar, 300 kr.
Tlf. 220660

**TIL SØLU**
Reolveggur, myrkt beisað, í trimum pørtum, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 422076

**TIL SØLU**
Skrivaraborð v/ tveimum skuffum til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 220660

**TIL SØLU VEGNA FLYTING**
2 dup. sovisofur
1 dup. song massiv, hvít 170 x 200
1 massivt furu sofaborð 145 x 82,5
1 massivt furu køksborð v/ plátu l. 160 b. 104, plátan 46,5
2 kurvastólar uttan hyndir
1 barnaskrivaraborð við hillum, hvítt laminat
2 frystiboksir Atlas Super lágorka 200-300 l, Vestfrost 500 l
Ymisk køksting so sum Braun hvirla v/saft pressu, grýtir.
Nógv ymisk amboð so sum: rungsag, stingsag, vinkulslípari, kúbein, sloggir
o.m.a.
Bøkur til HF brúk og lærarskúla.
Tlf. 310550

**VEGNA FLYTING**
selja vit song við tveimum boksmadrassum stødd 180x200, klædnaskáp 3 hurðar, spegl í miðjuni, alt lúta træ. Áhugað kunnu ringja
tlf. 314440

## Lutaseðlar

**FRÁ 7. FLOKKI Í VESTMANNA SKÚLA**
Hesir vinningar eru ikki heintaðir:
3) nr. 1662
7) nr. 1164
10) nr. 2175
Vinnarnir verða bidnir at ringja 424530 ella 424179 áðrenn 3.juli. Ikki heintaðir vinningar falla aftur til flokkin. Takk fyri stuðulin.

**FRÁ ARGJA BÓLTFELAG**
Vinnararnir til stuðulsrenningina hjá AB vóru:
1. 14191 ferð til Danmarkar og aftur
2. 18922 atgongumerki til landsdyst 16/8-2000
2. 18947 atgongumerki til landsdyst 16/8-2000
Tøkk fyri stuðulin. Vinnararnir kunnu venda sær á tlf. 314345.
Starvsnevndin

**HMU**
Tann 23. juni hevur Notarius Publicus fyri Eysturoynna drigið hesar vinningar:
1) 0000102
2) 0007724
3) 0003744
4) 0005098
5) 0004000
6) 0006640
7) 0006444
8) 0002838
9) 0005550
10) 0007951
11) 0005127
HMU takkar fyri stuðulin. Vinningarnir fáast við at venda sær til Heimamissións-Skrivstovuna, tlf. 422533, fax 422544 ella t-post
hm@post.olivant.fo

## Matur

**FJALSGARÐUR BJÓÐAR**
Ferðaløg, útferðir, bólkar, matin kunnu tit fáa á Fjalsgarði, um bílagt er frammanundan. Hervør er vert-urin.
Ringið tlf. 444522
Fax 444570

**RABARBUR**
til sølu.
Tlf. 424001

## Pløgg

**LÍTIÐ BRÚKT**
føroyskt skjúrt, stødd 36, til sølu.
Tlf. 314633

**TIL SØLU**
Tvær nýggjar, hondbundnar troyggjur til føroyska kvinnubúnan, til kvinnu og mann, miðal í stødd.
Tlf. 314699

**TIL SØLU**
Troyggja til før. kvinnubúnan til sølu fyri 600 kr. Er maskinbundin myrkablá og reyð. Bert brúkt tvær ferðir.
Tlf. 316587

**TIL SØLU**
Hondbundin, lítið brúkt, konufólkatroyggja til føroysk klæði, std. 36/38, til sølu fyri 950 kr.
Tlf. 310667

**YNSKIST**
Hevur nakar ein grønan skótabúna, std. S, at selja mær, so ring
Tlf. 444624

## Samband

**SAMBAND YNSKIST**
Maður mitt í 40'unum ynskir samband við kvinnu í aldrinum 35-45 ár. Barn/børn eingin forðing. Eg havi fast og gott arbeiði. 100% tagnarskylda.
Tak pennin fram og skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 99.120

**SAMBAND YNSKIST**
Drongur á bygd ynskir samband við gentu í 20-35 ára aldri. Drekkur og roykir ikki. Send nøkur orð og mynd og tú fært svar beinanvegin.
Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 120.23

## Súkklur

**DBS SÚKKLA**
28", við trimum gearum, sær út sum nýggj, til sølu.
Tlf. 314699

**DREINGJASÚKKLA**
stødd 8-10 ár, grøn, reyð, gul, svørt av slagnum Kenton, við 15 gearum, í góðum standi, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 311581 eftir kl. 18

**TIL SØLU**
Ljósareyð/hvít gentusúkkla, til 8-10 ár, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 422473, e. kl. 18

**TIL SØLU**
HP Omnibook 4150 fartelda, Intel 300 MHz, 4 GB HD, 64 MB ram + PCMCIA modem. Kostnaður 20.000 kr.
Tlf. 312425

**WINTER DREINGJASÚKKLA**
til 10 ár, trý gear, í góðum standi, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 310430

## Teldur

**NINTENDO 64**
við tveimum joystickum og sjey spølum + Rumble Pack til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 315491

**TOSHIBA**
Sat 220cs + taska, til sølu fyri kr. 7.000,-
Tlf. 444140

## Tónleikur

**BILANLEGG TIL SØLU**
Gott Pioneer anlegg v/ 100 w JBL forsterkara og tveimum hátalarum til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 444774

**NAD FORSTERKARI**
og Sony fløguspælari til sølu fyri 4.000 kr. Forsterkarin er frá 12/99 og fløguspælarin er frá 02/00. 100% OK. Garanti og fjarstýringar fylgja við.
Tlf. 313393

## Út- & Sjónvarp

**AIWA STEREOANLEGG TIL SØLU**
Hevur m.a. Nicam Prologic Surround v/ 5 hátalarum, pláss til 3 fløgur og nógvir aðrir hentleikar. Riggar sera væl saman við Prologic Surround video. Nýprísur 6.600 kr. Til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 315440

**JVC VIDEOKAMERA TIL SØLU**
Vanligt videokamera, ið eisini hevur innbygt Digital Fototól 52xZoom, innbygt ljós, fjarstýring, PC tilhoyr o.a. Videokamera & digitalt fototól – alt í einum og sera einkult. Sum spildurnýtt, hevur 2 ára garanti/trygging eftir. Nýprísur 6.100 kr. (í Danmark). Til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 315440

**PARABOL**
við móttakara, video og 24" sjónvarp til sølu fyri kr. 5.500,-
Tlf. 444140

**SAMSUNG VIDEO TIL SØLU**
Hevur m.a. Nicam Prologic Surround og Long play. Eitt sera gott video við øllum hentleikum. Riggar sera væl saman við Prologic Surround stereoanleggi. Nýprísur 4.200 kr. Til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 315440

## Ymiskt

**20 FÓT BINGJA**
fæst við at verða avheintað.
Tlf. 222794

**BAÐIKAR**
(gult) fæst við at avheinta tað.
Tlf. 314322 eftir kl. 14

**EIN FERÐASEÐIL**
til Ísland og aftur tá tað passar tær, til sølu fyri 2000 kr., virði 2800 kr.
Tlf. 320366 ella 210366

**FERÐASEÐLAR**
Ferð fyri tvey við Norrønu til Bergen og aftur til sølu.
Tlf. 447406

**EIN TRENINGSBONKUR**
av slagnum TOTAL GYM 1000, lítið brúktur, til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 375102 mobil 215102

**FARTLF. TIL SØLU**
Motorola V 3688 GSM fartlf. til sølu. Hevur eitt ótal av møguleikum. Kostar nýggj 5.895.
Tlf. 319800, e. kl. 18

**FERÐ FYRI TVEY**
vaksin og 2 børn við bili – Tórshavn, Hanstholm og aftur, hartil 1 viku á hotelli á Euro-Disneyland í París, íroknað morgunmatur. Eisini íroknað hotel eina nátt á út- og heimferð. Virði kr. 25.000,- til sølu fyri kr. 12.000,-
Tlf. 314799

**GØTU MENNINGAR-FELAG**
**INNHURÐAR**
6 innhurðar við karmi og listum til sølu fyri kr. 3.000,-
1 fyllingshurð til sølu fyri kr. 500,- mát 84 x 208 cm.
Tlf. 310590

**JØRÐ**
ynskist til láns ella leigu, helst í ella nærhendis havnini.
Tlf. 313133

**MØTTLASPENNI**
Víkingur, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 312682

**TELT YNSKIST**
Gott og vælviðfarið 2-mans telt ynskist til keyps.
Tlf. 219303

**TIL FØROYSKA BÚNAN**
Til børn: Tin & silvur plet.
Til vaksin: Silvurplet & sterling.
Heil sett ella støk.
T.d. Møtlaspennir, Brosjur, Spennir, Mallur, Stimar, Knappar o.a.
Fæst á hesum støðum:
Suðuroyar Heimavirki,
Eysturoyar Heimavirki,
Norðoya Heimavirki,
Prýðið á flogvøllinum og Sirri í Vágsbotni.
Framleitt hevur Torgerð Suðuroy, tlf. 373169

**TIL SØLU**
Rulliskoytur, std. 29, og ein hjólmur til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 286653 ella 220425

**TIL SØLU**
Bfrúkt vinkul inni trappa, 2,5 m høg.
Tlf. 315370

**TIL SØLU**
Einkult kókipláta til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 220660

**TIL SØLU**
Flott krystallgløs bíliga til sølu. Hvít-, reyðvíns-, øl- og likørgløs + ein karaffil, hondmálað, Dansk blå blomst frá Christine Holm.
Tlf. 449508, e. kl. 17

**TRØÐ Í PORKERI**
Um nóg høgt boð fæst selja vit trøðna matr. 214.
Tlf. 373939

**VIL NAKAR**
hava bil okkara við Norrønu til Danmarkar 30. juni ella 7. juli og uppaftur seinni í mánaðinum ella í fyrru helvt av august?
Tlf. 313133

**YNSKIST**
Glasdiskur, ið er vælegnaður til kiosk, ynskist til keyps.
Tlf. 316290 - 310767


# LUTASEÐIL



| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Toyota Corolla Hatchback (Frá Reyni Service) | virði | 169.400 kr. |
| 2. | Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland (Frá Smyril Line) | virði | 15.000 kr. |
| 3. | Gávukort frá Th. Dam á Hálsi | virði | 10.000 kr. |
| 4. | Gávukort frá Shell | virði | 5.000 kr. |
| 5. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 6. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 7. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 8. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 9. | Apex ferðaseðil fyri 1 persón | virði | 2.800 kr. |
| 10. | Føroyskt krov | virði | 1.000 kr. |

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo
Hestprent 314 555
STATOIL
Tórshavnar Ítróttarráð
2000 20 kr.

sosialurin
-har tað hendir




## TIPS 13 úrslit
**Vika 25**
**24.–26. juni**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Dinaburg–Trencin | 1 |
| 2. | FK Obilic–HNK Cibalia | X |
| 3. | Hapoel Petach–Linzer ASK | X |
| 4. | Hobscheid–Pelister | 2 |
| 5. | Luzern–Leiftur | X |
| 6. | Silkeborg–Dnepr Mogilev | 2 |
| 7. | Slaven Belupo–Glenavon | 1 |
| 8. | Stabæk–Floriana | 1 |
| 9. | Standard Liege–Dyn. Tblisi | X |
| 10. | Tatabanya–HB Torshavn | 1 |
| 11. | Vilash Mas.–Zaglebie Lubin | 2 |
| 12. | Vllaznia–Nea Salamina | 2 |
| 13. | Westerlo–Primorje | 2 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **33.035,- kr.** |
| 12 røtt: | **1.440,- kr.** |
| 11 røtt: | **151,- kr.** |
| 10 røtt: | **67,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## DUSINO
**Vika 25 – 25. juni**

Vinnaratøl: **01 - 02 - 08 - 13 - 14 - 15 - 16 - 17 - 19 - 20 - 21 - 24**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | **Eingin vinnari** |
| 11 í sama punti: | **3.135,- kr.** |
| 10 í sama punti: | **119,- kr.** |
| 9 í sama punti: | **26,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 25 – 24. juni**

Vinnaratøl: **01 - 07 - 10 - 16 - 22 - 23 - 24**
Eykatøl: **18 - 31**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **10.012.238,- kr.** |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | **75.201,- kr.** |
| 6 vinnaratøl: | **3.819,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **143,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **34,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 25 – 24. juni**

Jokaratal: **1-0-1-9-4-6-0**

| | |
|---|---|
| 7 røtt: | **Eingin vinnari** |
| 6 aftastu røtt: | **1.604.466,- kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **29.206,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.771- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **273,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **52,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

www.sosialurin.fo



Viðmerking:

# Hamarin ikki gloymdur

Tað harmar meg, at Hans Andreasen (Sos. 24/6-2000) hevur ta fatan, at »Hamarin á Argjum eigur ongan góðan í Tórshavnar býráð«, tí hetta er sjálvandi ikki so.

Hinvegin er tað nú einaferð so, at øll arbeiði kunnu ikki fáast frá hondini í senn. Neyðugt er eisini viðhvørt við raðfestingum – ikki minst, tá um asfaltering av vegum ræður.

Hóast býráðið ongantíð fyrr hevur sett so nógvan pening av til asfalt, ferðslu og reinhald sum í ár (13,9 milj. kr.), so røkkur játtanin kortini langt í frá til allar vegir og gøtur í kommununi (stívliga 136 kilometrar tilsamans!)

Av hesi orsøk ger tekniska nevnd hjá býráðnum á hvørjum ári ein *asfaltplan* fyri, hvørjir vegir og hvørjar gøtur standa fyri tørni at verða asfalteraðar.

Planurin verður gjørdur, *eftir* at nevnd og ráðgevar hava verið og kunnað seg við støðuna kring um í kommununi.

Kann í hesum sambandi heilsa og siga, at ein av vegunum, ið er við í asfaltplaninum í ár, *júst* er vegurin hjá Fíggjarmálastýrinum og út á Hamaran!

Arbeiðið er ætlað at byrja í hesi vikuni og asfalterað verður út til útstykkingina.

Vegirnir í sjálvari útstykkingini resta síðsta lagið av asfalti, men hetta er ikki við í asfaltplaninum í ár.

Orsøkin er, at fleiri í løtuni eru í gongd við at byggja, og vanligt er at bíða við at leggja síðsta lagið á til flestu húsini eru liðug.

Av øðrum arbeiðum, ið ætlanin er at gera á Hamaranum í ár, kunnu nevnast:



- Tryggjan av áarinntøkum (tvs. veitan og leggjan av ristum til inntøkini).
- Reguleringsarbeiði á Leitisvegi 22 í sambandi við at tveir kloakkbrunnar standa óhøgliga inni á privatari ogn.
- Býargartnarin hevur og er í ferð við at seta í stand og fríðka um økini, ið eru løgd sum fríøki.
- Í sambandi við at Rás Tórshavn skal útbyggjast til eisini at umfata Kollafjørð, er avgjørt at arbeiða víðari við at loysa hyggjaraviðurskiftini í øðrum pørtum av kommununi, herundir Hamarinum.
- Bussleiðin verður væntandi á nýggjárinum víðkað til eisini at umfata Hamaran. Arbeitt verður í løtuni við at gera útbjóðingartilfarið klárt.

At enda kann verða lagt afturat, at vanliga hugsanin millum býráðslimir er, at tá Marknagilsvegurin er liðugur, eigur næsta stóra vegarbeiðið í kommununi at verða nýggi *Glyvursvegur,* ið ætlanin er at gera úr Velbastaðvegnum (oman fyri kirkjugarðin) tvørtur um Sandá, niðan gjøgnum sokallaðu Cepa-trøðna og út á Hamaran.

**Vinarliga,**
**Leivur Hansen,**
**borgarstjóri**

# Føroya Umhvørvi í tølum – 1999

Onnur útgáva av »Føroya umhvørvi í tølum, 1999« er útkomin.

Frágreiðingin gevur eitt yvirlit yvir kanningar av umhvørvisligum týdningi, sum verða framdar í Føroyum. Vit hava valt at tikið stórar partar av tí fyrru útgávuni »Føroya Umhvørvi í tølum, 1997« við í hesa útgávuna. Serliga er hetta galdandi fyri økir, har vit ikki hava fingið nýggj tøl síðan. Afturat teimum evnum, sum vóru við í fyrru útgávuni, eru eisini tveir nýttir tættir tiknir upp: bakteriologiskar kanningar av salmonella í føroyskum fugli, sum verður nýttur til matna, og ein umhvørvisindikator sum burturkastnøgd.

Frágreiðingin er skrivað soleiðis, at hon í stuttum gevur eina yvirlitsmynd av úrslitum frá teimum kanningum, sum eru framdar. Dentur er lagdur á ávís djór, annaðhvørt tí tey eru av týdningi sum matvøra ella tí tey, orsakað av livihátti og útbreiðslu, eru hóskandi at siga nakað um føroyska umhvørvið.

Ætlanin við frágreiðingini er, at tær kanningar, sum verða gjørdar í Føroyum, ella sum hava týdning fyri fatanina av føroyska umhvørvinum, kom almenninginum til kunningar. Frágreiðingin skal kunna nýtast av lærarum og næmingum í framhaldsflokkum, lesandi, politikarum og fólki yvirhøvur, sum eru áhugað í umhvørvisviðurskiftum.

Tey, sum hava arbeitt við hesi útgávuni eru: Heidi Gregersen, høvuðsskrivari, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Maria Dam, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Eilif Gaard, Fiskirannsóknarstovan, Trygvi Vestergaard, Fróðskaparsetur Føroya, Kjartan Nordby, Apoteksverkið, Bryndis á Dunga, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Birna Mørkøre, Heilsufrøðiliga Starvsstovan.




**El-lærlingar fingið sveinabræv 17. mai 2000:** Rúni Debes, lært hjá Sunda El, Oyri. Tummmas Gudmundsen, lært hjá Torfinni Nielsen, Sørvági, Jan Heinesen, lært hjá Eltalvuvirkinum í Gøtu. Jonhard Høgnesen, lært hjá Elteknik í Leirvík. (fremst) Heini Jón Rasmussen, lært hjá Sæbjørn Poulsen í Havn, Poul Rouah, lært hjá J. T. Elektrik í Fuglafirði, Ronnie Samuelsen, lært hjá Tummas Eli Hansen í Havn

nøvn nú

## Heilsanir



Ein ár 1000 heilsan til Karen og Curt Nielsen. Somulei›is ein heilsan til Annu og Kristensu fyri trúgva tænastu í Harrans víngar›i.
***Heilsan samkoman Betania í Skopun***



***Gó›i Petur***
Ein hjartalig fø›ingardagsheilsan á tínum runda degi.
***Ynskja tínir arbei›sfelagar***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ...........................................................
...........................................................
...........................................................
...........................................................
...........................................................
...........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ...........................................................
Bústaður: ...........................................................
Bygd/býur: ........................... Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«